## Obama hittir Lama

Hvítu Húsini í Washington kunngjørdu í gjár, at andaligi leiðarin úr Tibet, Dalai Lama, kemur at vitja Barack Obama, forseta hósdagin í næstu viku. Kinesiska stjórnin hevur fleiri ferðir ávarað Obama ímóti at hitta Dalai Lama, og stjórnin hevur sagt, at ein fundur teirra millum kann fáa avleiðingar fyri viðurskiftini millum USA og Kina. Leiðslan í Beijing er ikki fegin um, at útlendskir leiðarar tosa við Dalai Lama, men kortini taka fleiri ímóti honum. Eitt nú hittust George Bush og Dalai Lama í 2007, og árið eftir hitti Dalai Lama franska forsetan, Nicolas Sarkozy.



## Bill Clinton fekk hjartaskurðviðgerð

Fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton hevur fingið eina hjartaskurðviðgerð á einum sjúkrahúsi í New York. Skrivstova hansara sigur, at fyrrverandi forsetin fekk ilt fyri bróstið, og at hann bleiv fluttur á Columbia Presbyterian Hospital. Har fekk hann ballónvíðkan, og sambært læknunum eydnaðist skurðviðgerðin væl. Tann 63 ára gamli Bill Clinton fekk bypass-skurðviðgerð fyri seks árum síðani. Fyrrverandi forsetin hevur havt úr at gera í seinastuni, tí tann seinasta mánaðin hevur hann verið ST-sendimaður í Haiti, sum varð rakt av ógvusligum jarðskjálvta í síðsta mánað.

# SDC-samstarv fer at gagna bankum og Elektron

**Føroysku peningastovnarnir og Elektron fáa munandi fyrimunir av at samstarva við Skandinavisk Data Center (SDC). Raksturin hjá peningastovnunum verður bíligari, og Elektron fær høvi at menna skipanir til 146 norðurlendskar peningastovnar**

TÍÐINDASKRIV
*frá Felagnum Føroyskir Peningastovnar*

Orðaskifti hevur tikið seg upp um, at føroysku peningastovnarnir fyri einum knøppum ári síðan gjørdu samstarvsavtalu við fyritøkuna SDC, sum stendur fyri at menna og reka skipanir fyri 146 peningastovnar í Norðurlondum.

Samsvarandi hesi avtalu arbeiða føroysku peningastovnarnir í løtuni við at knýta seg í SDC, men hetta merkir ikki, at samstarvið við Elektron, sum peningastovnarnir eiga saman við landinum, er í ferð við at halda uppat.

Tvørturímóti hava peningastovnarnir gjørt stórar íløgur í útgerð til Elektron í sambandi við umleggingina, og hóast SDC fer at veita peningastovnunum summar grundskipanir, fer Elektron framvegis at standa fyri øllum samskiftinum hjá peningastovnunum og veita teimum serskipanir.

Avtalan við SDC er gjørd, tí peningastovnarnir fáa munandi rakstrarfyrimunir av at samstarva um grundskipanir í einum stórum felag heldur enn einum lítlum. Á einum altjóðagjørdum marknaði er hetta neyðugt fyri at tryggja kappingarførið.

Samstundis sum peningastovnarnir fara at samstarva við SDC, fær Elektron høvi at førleikamenna seg munandi meira enn frammanundan, tí avtalað er, at Elektron skal menna nýggjar skipanir til teir 146 norðurlendsku peningastovnarnir í SDC og ikki einans teir føroysku.

Á hendan hátt fær Elektron sera góðar møguleikar at vaksa og knýta týðandi handilssambond við útheimin – úr Føroyum.

Ført hevur verið fram, at løgtingið missir løggávurættin yvir føroysku peningastovnunum og teirra virksemi, um teir fara at samstarva við SDC. Hetta er ikki so, tí so leingi ein fyritøka rekur vinnuvirksemi í Føroyum, er hon undir føroyskari løggávu, og hetta verður eisini galdandi fyri peningastovnarnar í framtíðini.

Vanligt er í dag, at samstørv millum KT-fyritøkur og peningastovnar fara fram tvørtur um landamørk. Eitt nú hava amerikanskir peningastovnar grundskipanir hjá KT-fyritøkum í India, tí hetta loysir seg best, og samstarvið í SDC er onki øðrvísi. Norskir, svenskir, danskir og skjótt føroyskir bankar samstarva um somu grundskipanir í sama felag.

Trygdin í sambandi við upplýsingar hjá viðskiftafólkum verður framvegis í hásæti, og hvørki SDC, Elektron ella peningastovnarnir fara nakrantíð at slaka upp á hana, tí trygd og álit eru avgerandi fyri trúvirðið hjá peningastovnum og KT-fyritøkum.

Tá ført verður fram, at trygdin minkar, tí transaktiónir hjá føroyskum bankakundum skulu av landinum, kennir Felagið Føroyskir Peningastovnar seg noytt at vísa hesum aftur. Føroyingar hava síðan 1987 brúkt FR-kortið, ið virkar soleiðis, at upplýsingar fara av landinum til viðgerðar. Hetta hevur í 23 ár ikki verið nakar trupulleikar og verður tað heldur ikki í samstarvinum við SDC.

Føroysku peningastovnarnir eru sannførdir um, at menningarmøguleikarnir hjá bæði peningastovnunum og Elektron verða munandi betri, um samstarvið verður víðkað út um landoddarnar. At ganga øvugtan veg er at avmarka hesar møguleikar.



## Borgarstjórin í Havn hittir Vígdis Finnbogadóttir

TFÍÐINDASKRIV

Í samband við at nevndin í kommunala arbeiðsgevarafelagnum er á vitjan Íslandi, og m.a. hevur fund við Sveitafelagið og kommunur har, var formaðurin og borgarstjórin í Havn á vitjan á føroysku sendistovuni í dag, har hann m.a. hevði fund við Vígdis Finnbogadóttir, fyrrverandi forseta Íslands.Ferðalagið hevur annars vitjað á Hafnarfirði, í Hveragerði, í Árborg, Selfoss og kommunur har um leiðir, har borgastjórar tóku ímóti. Nógv var tosað um støðuna í Íslandi og hvussu kommunurnar figgjarliga hava tað í løtuni. Endamálið er at kanna, hvussu støðan er í Íslandi, hvussu íslendingar í eini kreppustøðu skipa býtið millum land og kommunur, hvussu støðan er á arbeiðsmarknaðinum og hvussu lønarsamráðingarnar ganga, og annars at kanna tær broytingar í samskifti millum land og kommunur, sum kreppan hevur havt við sær.


Keypssamtøkan í Hoyvík

FK í Hoyvík sóknast eftir

***Fólki at sita við kassan***



**at byrja 1. mars**

**Arbeiðstíð:**
mánadag - fríggjadag: Frá 8.45 til 14
leygardag: 8.45 - 14.30
frí annanhvøn leygardag,
- miðalarbeiðstíð 23 tímar um vikuna

**Løn:**
Sambært sáttmálan við S & K

Nærri fæst at vita við at venda sær til Bent Lundsgaard, tel 214016

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. februar:

**FK Hoyvík**
**Brekkutúni 9**
**FO 188 Hoyvík**
**att: Bent Lundsgaard**
**214016 - bl@fk.fo**


# Faroe Petroleum byrjar at bora Fogelberg

TÍÐINDASKRIV

Faroe Petroleum boðar frá, at felagið nú er farið undir at bora á Fogelberg leitimiðinum í Norska Havinum; felagið 15 prosent av loyvinum.

Fogelberg, sum er á loyvi PL433, er eitt stórt olju leitimið, ið liggur umleið 8 km norðanfyri Smørbukk oljuleiðina. Jarðfrøin á Fogelberg líkist nógv tí á Morvin leiðini, sum liggur 10 km í ein útsynning úr Fogelberg, har Statoil boraði ein væleydnaðan metingarbrunn í 2006.

Oljufeløgini, sum luttaka í boringini eru Centrica Resources Norge, ið er fyristøðufelg, Petro-Canada Norge, E.ON Ruhrgas Norge og North Energy. Boriskipið West Alpha skal bora brunnin, ið væntandi tekur umleið 45 dagar at bora. Loyvi PL433 varð tillutað felagnum í 2007, og er í millum tey fyrstu loyvini, sum Faroe Petroleum fekk í Noregi.

Fogelberg er tann fyrsti av fimm brunnum, sum felagið ætlar at bora í 2010. Ein annar norskur brunnur verður væntandi boraður í vár. Hetta er ein metingarbrunnur í Norska Havinum, sum kallast Maria, har Faroe Petroleum eigur 30%. Hinir tríggir brunnarnir er leitibrunnar á Atlantsmótinum. Hesir eru Anne Marie á føroyskum øki, har ENI er fyristøðufelag, Cardhu á bretskum øki, har BP er fyristøðufelag, og Lagavulin, eisini á bretskum øki, har Chevron er fyristøðufelag.

Fulfiggjað tíðindaskriv á enskum er á heimasíðu felagsins www.fp.fo